venda innaftur á Klaksvík. Soleiðis hevði skiparin ikki vent skipinum, var tað ikki tað, at hann í hesi somu løtu bleiv so argur um, at motorpassarin hevði verið so gáloysin at gloyma loggið. Hon vendi ikki nóg skjótt, men fór larrandi á land onkustaðni tætt við bygdina Strond.

Bestimaðurin, Poul Johannes, fekk litið upp í hendur at siga reiðaranum frá. Hann fór ikki til Klaksvíkar, men teir settu bátin út og róðu yvir til Haraldsunds. Haðani ringdi hann til Jóan Jakku og bar honum boðini. Jóan Jakku var skjótur norður, og tá var hann ikki illur, men hevði heldur samkenslu við skip-aranum, tí tað fyrsta hann segði við heimildarmann mín, sum tók ímóti honum, var: Nú er synd í Símuni.

Skipið fekk ikki stóran skaða, og hendingin hevði helst verið gloymd í dag, um ikki skiparin gjørdi tað "mistak" at lata tann hittinorðaða bestamannin bera reiðaranum boðini.

Tann mynd, ið teknað verður í eini ævisøgu, er fyri ein stóran part sett saman av størri og smærri klípum, sum høvundurin velur at brúka av tí, hann hevur funnið fram til, og tað kann vera eitt sindur av tilvild, hvat hann finnur. Sum Jústines so rætt skrivar, er hetta ikki søgan um Kaj, men hansara søga um Kaj. Og hendan søgan hjá Jústinesi hevur fleiri dygdir. Lýsingin, hann gevur av honum, fyrstu ferð teir hittast, er væl skrivað og beinrakin. Hann er góður við persónarnar, hann rósar teimum, og erligur sum hann er, gevur hann teimum ikki meira rós enn hann heldur teir hava uppiborið. Hann hevur verið nærlagdur í sínum kanningararbeiði, og her er mangt bæði stuttligt og forvitnisligt grivið fram, men mær hevði dámt bókina betur, um hon var minni roksut. Endurtøkurnar eru nógvar, og viðhvørt verður sveimað heldur langt, uttan at nakað av týdningi verður lagt afturat.

Jústines dugir væl at siga frá, fyri tað mesta er hann sera greiður, frásøguhátturin lættur og óhátíðarligur, og samstundis sum bókin er ein áhugaverd lýsing av nøkrum persónum, ið hava skarað framúr á sínum øki, er hon eisini eitt gott íkast til okkara vinnusøgu.




*Tað bendir nú tann vegin, at Smyril-Line fær tilført neyðuga kapitalin, soleiðis at endalig avtala kann fáast í lag við lánsveitarar felagsins*

# Smyril Line fær pengar

**Hetlendingar sigast vera til reiðar við 32 mió kr. Restina skulu Framtaksgrunnurin, Tryggingarfelagið og ein søla av Hotel Føroyum útvega**

SMYRIL-LINE
*Jákup Mørk*

Hetta vita hetlendskir miðlar at siga sambært Útvarpinum.

Sambært miðlunum, so hevur hetlendski menningargrunnurin gjørt av, at teir vilja seta 3 mió pund afturat í felagið. T.e. á leið 32 mió kr.

Hartil verður sagt, at Framtaksgrunnurin og Tryggingarfelagið Føroyar eisini vilja økja um sín innskotspening, og samanlagt er sostatt ætlanin at útvega 65 mió kr. í nýggjum innskotspeningi.

Áður hevur Smyril-Line boðað frá, at ætlanin er fáa eina samlaða kapitalinnspræning á 100 mió kr., og skulu tær seinastu 35 av hesum fáast til vega við eini sølu av Hotel Føroyum, skilst í hetlendsku miðlunum.

Eginpeningurin – ella innara virði - hjá Hotel Føroyum var við árslok 2003 knappar 12 mió kr. Men vónir eru helst um, at felagið kann seljast fyri væl meira enn hetta.

Avlopini seinastu trý roknskaparárini hava verið millum tvær og fimm mió kr., og við hesum útgangsstøði er ikki óhugsandi, at felagið kann forrenta ein keypsprís, sum fer at tátta upp ímóti ætlaða søluprísinum.

# Mellem kor og skib

**Bókin Mellem kor og skib. Jacob Dahls færøske postiller eftir Jákup Reinert Hansen er útkomin**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Ritgerðin varpar ljós á eitt týdningarmikið tíðarskeið í føroyskari kirkju- og mentanarsøgu. Bæði viðvíkjandi bíbliutekstum, ritualum, sálmasangi og prædiku hava vit mest Jákup Dahl, prósti fyri at takka, at føroyskt gjørdist kirkjumál.

Í greining síni av prædikum Dahls vísir Jákup Reinert Hansen á, hvussu gudfrøðilesnaðurin í Keypmannahavn fyrst í 20. øld rann saman við eini boðan, sum natúrliga tók føroysk viðurskifti til viðgerðar. Greitt verður haraftrat frá, hvussu upprunaprædikur vórðu skrivaðar um, so tær skuldu hóska at verða lisnar sum lestur.

Lestarbøkurnar hjá Jákupi Dahl gerast sostatt ein fyrimynd fyri føroyskari kristintrúgv.

Føroya Fróðskaparfelag hevur útgivið bókina, sum kostar 370 krónur.




# Slóðir í heilsuverkssøguni

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Soleiðis er heitið á nýggjari bók, sum Elin Súsanna Jacobsen hevur skrivað.

Í seinna parti av 18. øld vaks ansurin fyri fólkaheilsuni og sannkenningin av, at tað almenna átti at taka størri ábyrgd av at skipa fyri góðari heilsutænastu. Soleiðis var víða hvar í Norðurevropa, og hetta var eisini galdandi í Føroyum.

Bókin lýsir, hvørjar heilsutænastur vóru í Føroyum í eldri tíðum. Ein kapitul er um Argjahospital, ein annar um elstu læknasøguna. Men mest verður gjørt burturúr at lýsa tær heilsutænastur, sum vuksu fram í 19. øld í Føroyum, og at viðgera heilsupolitiskar tankar, ið lógu til grund fyri teim støðugu royndum at fáa fleiri læknar, betri ljósmøður, sjúkrahús og ymsar heilsulógir. Henda søgan gevur samstundis innlit í heilsulig og sosial viðurskifti, og fortreytir og vilja fólk-sins at taka undir við at leggja støði undir eitt nútímans heilsuverk.

Føroya Fróðskaparfelag gevur út, og bókin kostar 270 kr í bókabúðunum.